## Bardagar í Pakistan

Harðir bardagar hava verið millum pakistanskar trygdardeildir og uppreistrarmenn hjá Taliban í Mohmand, sum er á markinum millum Pakistan og Afghanistan. Ein talsmaður fyri trygdardeildirnar sigur, at millum 25 og 30 uppreistrarmenn eru falnir í bardøgunum. Trygdardeildirnar hava mist ein mann, og fýra eru særdir, sigur talsmaðurin. Mohmand-økið er í landspartinum Bajur, sum er kent sum reiður hjá víðgongdum islamistiskum kreftum, og í seinastuni hevur pakistanski herurin hevur gjørt fleiri álop á støðir hjá Taliban har.



## Grikkar spara

Grikska stjórnin kunngjørdi í gjár fleiri tiltøk, sum skulu fáa búskapin aftur á beint. Millum annað hevði stjórnin uppskot um at lækka lønina hjá almennum starvsfólki, samstundis sum tollur og meirvirðisgjaldið hækka. Harafturat hevur stjórnin skotið upp, at ongar eftirlønir hækka fyribils. Stjórnin hevur sett sær fyri at minka hallið úr 12,7 í 8,7 posent av bruttotjóðarframleiðsluni, og ta ætlanina hevur ES góðkent. Men tey grikska fakfeløgini og flokkarnir vinstrumegin miðjuna hótta við fleiri mótmælistiltøkum ímóti politikkinum hjá stjórnini.

# Óvurderligar royndir

**Í nærmastu framtíð fer Bakkafrost á børsin í Oslo, og í sambandi við skrásetingina hevur Føroya Banki verið annar av ráðgevunum. Tað hevur skapt peningastovninum góðar og hollar royndir á økinum**



*John Rajani hevur staðið á odda fyri ráðgevingini hjá Føroya Banka í sambandi við, at Bakkafrost nú verður skrásett á børsinum í Oslo*

BØRSSKRÁSETING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Talan hevur verið um eina longri tilgongd í sambandi við ráðgevingina til Bakkafrost, nú teir verða skrásettir á børsinum í Oslo.

- Hendan tilgongdin byrjaði longu heilt afturi í 2006, tá Bakkafrost legði saman við alifeløgunum í Norðoyggjum. Tá spratt ein ætlan um, at Bakkafrost fyrr ella seinni skuldi skrásetast á børsinum, sigur John Rajani, sum vegna Føroya Banka hevur staðið á odda í ráðgevingarareiðinum.

Tá so støða varð tikin í 2008 um, at nakrir av somu eigarunum, sum áttu Bakkafrost, keyptu Vestlaks frá Føroya Banka, og tankar tá vórðu gjørdir um, einaferð at leggja feløgini saman, gjørdist ætlanin meiri verulig, og tá byrjaði arbeiðið av álvara at fyrireika skráseting av Bakkafrost á børsinum í Oslo.

Og slíkt ráðgevingararbeiði eru nýggjar royndir hjá Føroya Banka við stórum týdningi.

- Tað er tað avgjørt. Hetta er jú eitt stórt felag, og talan er eisini um eitt rættiliga stórt og umfatandi ráðgevingararbeiði, tí ein børsskráseting krevur rættiliga nógv av felagnum og ikki minst av ráðgevarunum. Tað skal gerast eitt dokumentatiónsarbeiði, sum skal liggja til grund fyri skrásetingini, millum annað skal eitt prospekt gerast, sum er eitt sølutilfar, ið keyparin skal fyrihalda seg til, sigur John Rajani.

Undan hesum er tó gjørt eitt rættiliga umfatandi arbeiði í sambandi við, at feløgini skulu leggjast saman. Hartil skal roknskapurin gerast eftir altjóða roknskaparreglum, og arbeitt hevur verið undir rættiliga stuttum skotbrái.

- So tað er eitt rættiliga umfatandi arbeiði, ið Føroya Banki og Nordea hava gjørt, eisini í samstarvi við advokatar og grannskoðarar, sigur John Rajani.

### Neyv meting

Í teirra ráðgeving hava Føroya Banki og Nordea mett, at partabrøvini hjá Bakkafrost eiga at verða seld fyri eitt stað millum 27 og 31 norskar krónur.

- Bakkafrost fer í framtíðini at verða dagliga mett í mun til onnur alifeløg, og um tú hevur við eitt alifelag í Føroyum at gera ella eitt í Noregi ella Skotlandi, so er ikki so ógvuliga stórur munur á. Aling og framleiðsla fara í stóran mun fram á sama hátt, og tí verður útgangsstøði tikið í, hvat hini alifeløgini verða handlað til á børsinum, sigur John Rajani.

Haraftrat hava serliga Nordea og Carnegi í hesum førinum verið úti hjá sínum kundum á partabrævamarknaðinum og spurt, hvat teir halda Bakkafrost er vert.

- Og har hava vit so fingið eina rættiliga ítøkiliga afturmelding frá einum rættiliga stórum tali av potentiellum keyparum, har teir melda út, hvat teir eru sinnaðir at keypa hesi partabrøvini fyri. Og tað er millum annað í tí og einari meting, at prísleganin er sett, sigur John Rajani.

### 386 til 437 milliónir

Føroya Banki eigur í løtuni 33,6% av virðinum í Bakkafrost, og í sambandi við skrásetingina á børsinum í Oslo selur bankin sín ognarpart av alifyritøkuni.

Útrokningar vísa, at samlaða virði av Bakkafrost liggur eitt stað millum 1,15 og 1,3 milliardir danskar krónur, og tá er ikki trupult at rokna út, at Føroya Banki fer at forvinna eitt stað millum 386 og 437 milliónir krónur við søluni av partabrøvunum í Bakkafrost.

Og tað má sigast ikki at vera so galið tá hugsað verður um, at bankin keypti triðingin av fyritøkuni fyri 50 milliónir krónur.

Men fyri at Føroya Banki skal fáa hesar pengarnar inn, má onkur keypa hesi partabrøvini, og so er bara spurningurin, hvussu fólk fyrihalda seg, nú partabrøvini verða boðin út til tekningar frá mánadegnum av.

- Tað er rættiliga einfalt. Tað er bara at fara inn í sín peningastovn og tosa við sín kundaráðgeva, so verður eitt tekningarskjal útflýggja til útfylling. Tað er ikki neyðugt at koma inn í Føroya Banki, men bara at brúka sín dagliga peningastovn, sigur John Rajani.

Hann sigur tó, at í tráð við vanligar reglur á børsinum í Oslo er minsta mark fyri keypi 500 partabrøv, og tað svarar til góðar 10.000 krónur.

Hinvegin ber væl til at nýta sína pensjónsuppsparing til at seta í partabrøv. Einasta treyt er, at í mesta lagi 20% av uppsparingini verður gjørd í sama partabrævið.

John Rajani væntar ikki, at tað verður nakar trupulleiki at selja tey gott 22 milliónir partabrøvini, sum verða boðin út í sambandi við børsnoteringina hjá Bakkafrost á børsinum í Oslo.